UTTAN ÚR HEIMI

## Norskir oljupengar til vápn

Ein frágreiðing, sum norska fíggjarmálaráðið hevur latið gera, staðfestir, at norski oljugrunnurin kann halda fram at seta pengar í fyritøklur, sum gera ymisk vápn so sum bumbur og minur.

Fleiri hava funnist at, at oljugrunnurin hevur sett pengar í dótturfeløg hjá fyritøkuni Singapore Technologies, sum gera landminur. Tey atfinningarsomu halda tað vera heilt burturvið, at almennir norskir pengar verða nýttir til vápnaídnað, samstundis sum tað almenna Noreg roynir at virka fyri friði ymsastaðni kring heimin.

Frágreiðingin hjá fíggjarmálaráðnum í Oslo staðfestir, at tað er ikki í stríð við altjóða fólkarættin, at oljugrunnurin ger íløgur í feløg, sum gera vápn, og Per-Kristian Foss, fíggjarmálaráðharri skal nú gera av, um grunnurin skal sleppa at halda fram við íløgum av hesum slagnum.

## Loyva kjarnorkueftirliti

Norðurkoreansku myndugleikarnir eru nú til reiðar at lata fremmandar eftirlitsmenn kanna landsins kjarnorkuútbúnað.

Tað segði japanski forsætisráðharrin, Junichiro Koizumi, í gjár. Koizumi hitti fyrr í vikuni norðurkoreanska leiðaran, Kim Jung-il.

Sambært forsætisráðharranum er Norðurkorea sinnað at lata menn hjá altjóða kjarnorkustovninum IAEA kanna landsins kjarnorkuútbúnað og tær verkætlanir, sum myndugleikarnir hava. Summi vilja vera við, at Norðurkorea roynir at fáa sær kjarnorkuvápn, men hesum hava norðurkoreanar víst aftur.

## Hávur við Mallorca

Spanskir fiskimenn, sum royna við tætt við frítíðaroynna Mallorca, siga, at har er nógvur hávur at síggja.

Ein av fiskimonnunum, Rafael Mas, sigur, at hávurin heldur serliga til norðan fyri oynna, og teir hava ongantíð sæð so nógvan háv har fyrr. Bara ta seinastu vikuna hava fiskimenninir fingið tíggju hávar.

Hávarnir eru meiri enn fýra metrar til longdar og viga góð 600 pund. Fiskifrøðingarnir siga, at hávarnir eru av einum slagi, sum er vanligt í Miðjarðarhavinum, men at hetta hávaslagi vanliga heldur til á djúpum vatni. Hávurin er ikki vandamikil fyri fólk, siga fiskifrøðingarnir.

## Nansen í Moskva

Mikudagin varð ein standmynd av tí kenda norska pólgranskaranum Fridtjof Nansen avdúkað í Moskva.

Russiska sjónvarpið TVS sigur, at tað er ikki sum pólgranskari, at russar hava valt at heiðra Nansen, men heldur fyri tað arbeiðið, sum hann gjørdi fyri svøltandi fólk í Ukraina og flóttafólk í Armenia.

Fridtjof Nansen fekk friðarheiðursløn Nobels fyri arbeiðið, sum hann gjørdi í 1920-árunum fyri táverandi heimsfelagsskapin. Tann nýggja standmyndin er tí hóskandi sett uttan fyri skrivstovuna hjá Reyða Krossi í Moskva.

# Krevjað Norðurkorea revsað

**Nógvir japanar eru í øðini, nú norðurkoreansku myndugleikarnir hava váttað, at ellivu japanar vórðu burturfluttir til Norðurkorea í sjeyti- og áttatiárunum.**

NORÐURKOREA-JAPAN
*Árni Joensen:*



*Samstundis sum viðurskiftini millum Norðurkorea og Japan eru spent, eru viðurskiftini millum Norður- og Suðurkorea batnað munandi. Her eru suðurkoreanskir hermenn farnir undir at beina fyri minum á markinum millum londini. Eisini er avgjørt at knýta jarnbreytar- og vegasamband tvørtur um markið*

– Norðurkorea má revsast. Stjórnin má seta hørð revsitiltøk í verk ímóti landinum, segði talsmaðurin hjá einum tvørpolitiskum japanskum tingbólki í gjár eftir ta óhuganligu avdúkingina av lagnuni hjá teimum ellivu horvnu japanunum.

Tað var týsdagin, at norðurkoreanski leiðarin, Kim Jung-il, greiddi japanska forsætisráðharranum, Junichiro Koizumi, frá, at tað var Norðurkorea, sum hevði burturflutt teir ellivu japanarnar. Hann bað samstundis japanska stjórnarleiðaran og japanska fólkið um umbering og lovaði, at slíkt skal ongantíð henda aftur. Kim Jung-il upplýsti samstundis, at fýra av teimum rændu japanunum eru framvegis á lívi.

Men japanar eru ikki nøgdir við umberingina. Flestu japanar krevja, at norðurkoreanska stjórnin skal koma við einari nágreiniligari frágreiðing um tað, sum hendi, og avvarandi hjá teimum sjey, sum eru deyð í Norðurkorea, krevja allar smálutir lagdar fram.

Stríðið um tey ellivu horvnu hevur leingi sett dám á viðurskiftini millum Japan og Norðurkorea. Tokyo hevur í fleiri ár kravt, at Norðurkorea skuldu viðganga, at landið hevði rænt og burturflutt tey ellivu fólkini, og at myndugleikarnir í Pyongyang skuldu upplýsa, hvat var vorðið av teimum. Treytaleys umbering hevur eisini verið eitt krav úr Tokyo.

### Darvar friðartilgongdini

Men nú norðurkoreanar loksins hava viðgingið burturflytingarnar og biðið um umbering, hevur tað elvt til slíka vreiði í Japan, at tað er ein spurningur, um hetta fer at bøta um viðurskiftini millum londini.

Stjórnarkeldur í Tokyo søgdu í gjár við blaðið Japan Times, at tann óhugnaliga norðurkoreanska váttanin fer uttan iva at darva arbeiðinum at bøta um viðurskiftini millum londini bæði. Koizumi forsætisráðharri hevur sagt, at stjórnin er ikki nøgd við tað, sum er komið fram, og at stjórnin fer at krevja, at norðurkoreanar revsa teir seku. Tað hevur Kim Jung-il givið tilsøgn um. Stjórnin í Tokyo vil eisini hava eina nágreiniliga frágreiðing um, hví norðurkoreansku myndugleikarnir rændu og burturfluttu tey ellivu fólkini.

Japanska stjórnin hevur eisini gjørt greitt, at hon fer at leggja trýst á norðurkoreansku stjórnina, so teir fýra japanarnir, sum framvegis eru á lívi, sleppa aftur til Japan sum skjótast.

# Amerikanarar sleppa undan rættarsókn í Haag

**Nú hava níggju lond lovað, at tey fara ikki at senda amerikanskar ríkisborgarar til nýskipaða revsirættin í Haag.**

USA OG REVSIRÆTTURIN
*Árni Joensen:*

Mikudagin skrivaðu USA og Usbekistan undir ein sáttmála, sum sigur, at usbekisku myndugleikarnir fara ikki at senda amerikanskar ríkisborgarar til rættarsókn í altjóða revsirættinum í Haag.

Týsdagin skrivaðu USA og Mauritania undir ein tilsvarandi sáttmála, og mánadagin fekk USA eisini ein slíkan sáttmála við Dominikanska Lýðveldið.

Sostatt hava níggju lond nú skrivað undir uppá, at tey fara ikki at lata altjóða revsirættinum amerikanskar ríkisborgarar. Hini londini, sum hava gjørt tílíkar sáttmálar við USA, eru Ísrael, Eystur Timor, Marshalloyggjarnar, Palau, Rumenia og Tadjikistan.

Av teimum níggju londunum eru tað bara Tadjikistan, Rumenia og Marshalloyggjarnar, sum hava staðfest sáttmálan um altjóða revsirættin. Dominikanska Lýðveldið og Usbekistan hava skrivað undir sáttmálan, men hava ikki staðfest hann.

USA vil ikki viðurkenna revsirættin, tí landið ber ótta fyri, at amerikanskir hermenn kunnu verða drignir fyri rættin av politiskum orsøkum. Seinastu mánaðarnar hava amerikanskir diplomatar roynt at fáa onnur lond at binda seg til ikki at lata rættinum amerikanskar ríkisborgarar, og hetta hevur møtt harðari mótstøðu nógvastaðni, serliga í Evropa.

# ítróttur

Nr. 180 • fríggjadagur • 20. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB eigur teir bestu í 5. deild




*5. deild hjá HB, sum um vikuskiftið vann deildina. Standandi f.v. Birgir Hansen, Hans Waag, Jónfinn Simonsen, Tummas Óli Mortensen, Johannes Ejdesgaard, Petur Amon Dalbø, Gunnar í Liða, Kári Nielsen og Regin Nolsøe. Húkandi f.v. Marni Mortensen, Birgir Enghamar, Erling Eysturoy, Ingi Kirke, Bjarki Ellefsen, Árni Arge og Eirikur Rasmussen. Á myndini vantar Leif Olsen*

*Mynd: www.hb.fo*

**Hóast teir alt seinna umfarið vóru ellivu ímóti tíggju, so megnaði NSÍ, sum hevur vunnið deildina seinastu fimm árini, ikki at halda tørn um leiðsluna, teir høvdu fingið í 1. hálvleiki**

5. DEILD
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin var besta liðið hjá HB í Runavík og syrgdi fyri, at møguleikin hjá NSÍ at vinna fyrsta meistaraheitið gjørdist nógv minni, enn hann hevur verið síðani eina ferð í summar.

Longu leygardagin vóru teir í HB í Eysturoynni og varskógvaðu um, at teir ikki eru at spæla við í ár. Tá var tað 5. deildarliðið, sum í Gøtu vann finaluna um FM heitið. Úrslitið ímóti NSÍ var 4–1. NSÍ hevur annars verið einaráðandi í hesi deildini seinastu árini. Teir hava vunnið allar finalurnar frá og við 1997, og fleiri ferðir hava teir ligið á júst HB.

Tað var eisini nógv, sum bendi á, at tað aftur hesa ferð skuldi eydnast hjá NSÍ. Dygst undan steðginum royndi Símun Danielsen seg við skoti ímóti málinum. Petur Amon Dalbø, sum í síni tíð var góður á besta GÍ liðnum, vardi á strikuni. Hann var kortini ikki málverji, og tá hann brúkti hendurnar, so hevði Niklas á Líðarenda einki annað val, enn at senda hann av vøllinum. NSÍ fekk brotsspark, og tað sendi Símun Danielsen framvið Erlingi Eysturoy, og so var hálvleikur.

Tí tóktist leiðin til sætta FM heitið á rað og harvið møguleikin at vinna ferðasteypið til ognar at liggja víðopin hjá NSÍ. Men soleiðis skuldi tað ikki ganga.

Hóast teir vóru færri á vøllinum, so megnaðu teir í HB at hava bóltin mesta partin av seinna umfarinum, og teir skoraðu fýra mál.

Tað fyrsta skoraði vinstri vongverjin Marni Mortensen. Royndin var úr 27 metrum, og bólturin sat heilt uppi undir handaru samankomingini. Tað minti mest av øllum um málini, sum Paul Breitner skoraði fyri Vesturtýskaland eitt nú í HM endaspælinum í 1974 og um tey, sum hollendsku spælararnir skoraðu í HM endaspælinum í 1978! Og tað er ikki lygn.

Tíggju minuttir undan leikloki prikaði Gunnar í Liða bóltin í málið eftir horna úr høgru, sum bleiv snittað víðari. So royndi NSÍ at fara fram á vøllin, men orkan var einki serlig, og manningin man hava verið betri í fleiri av undanfarnu finalunum – í hvussu so er hevur hon verið yngri, um teir somu spælararnir hava verið við í fleiri ár!

NSÍ hevði onga tyngd í álopinum. Í staðin var tað Kári Nielsen hjá HB, sum slapp einsamallur avstað og setti framvið málverjanum, og í síðstu løtu var tað Jóhannes Ejdesgaard, sum fór sjálvur í høgru og setti framvið NSÍ málverjanum.

Merkisvert var tað, at tríggir, sum í ár hava verið ella eru venjarar í 1. deild vóru á vøllinum – Mathias Davidsen og Trygve Mortensen hjá NSÍ og Kári Nielsen hjá HB.

Hóast fótbóltsaldurin er farin at tyngja, so høvdu teir í HB orku til at fegnast um sigurin. Haldgrím Gregersen handaði steypið, sum hann sjálvur gav 5. deild at kappast um í 2000, eftir at NSÍ í 1999 hevði vunnið steypið til ognar, sum Haldgrím í 1985 gaav at kappast um. Og FSF bossurin, Dánial Andreasen, var komin ígjøgnum holið úr Leirvík og til Gøtu við gullkrónunum til HB spælararnar og silvurkrónunum til NSÍ menninar.

Teir í NSÍ fóru til Elduvíkar at fáa sær ein bita leygarkvøldið. Tað hava teir gjørt undanfarnu árini, tá teir hava vunnið, og teir høvdu bílagt sær pláss aftur hesa ferð, sjálvt um manningarliga støðan mundi leggja upp til, at teir ikki vóru so sannførdir um, at tað skuldi eydnast.

Høvuðsrøðarin undanfarnu árini var ikki við. Tórbjørn Jacobsen var við fíggjarnevndini á veg til Isle of Man. Teir vóru undir dystinum staddir í lufthavnini í Manchester. Ábyrgdarmaðurin hjá NSÍ, Sigmund Johannesen, mundi kanska kenna seg eitt sindur órógvaðan í sínum starvi. Einar tjúgu ferðir undir dystinum vóru telefonboð úr Manchester. Tað var ikki Sir Alex, sum var í hinum endanum, men Tórbjørn Jacobsen, sum fregnaðist.

Í Elduvík tóku teir í NSÍ saman um. Eitt var taktikkur og orka. Men vit skilja á lagnum, at tað vóru heilt onnur viðurskifti, sum teir vístu á, tá orsøkin til tapið skuldi finnast. Ein av spælarunum hevur undanfarin ár altíð brúkt fyrrapartin finaludagin at fiska íl í, og tá hevur gingið væl. Hann var ikki og fiskaði síl leygarmorgunin og niðurstøðan var, at hetta mátti vera orsøkin til, at tað ikki eydnaðist í ár.

Gomlu HBarunum verður ynskt tillukku við FM heitinum.

## Rætting

Í mikudagsblaðnum, har vit viðgjørdu venjaraspurngin í fleiri føroyskum feløgum, stóð millum annað at lesa: »Piotr Krakowski, sum í summar fekk Oddbjørn Joensen at hjálpa sær við venjingini, verður ikki venjari hjá B36 næsta ár«.

Vit skulu hervið koma við eini umbering til B36 fyri háttin, sum hetta var framborið uppá. Talan var her um eina meting hjá greinaskrivaranum, og byggir hetta ikki á úttalilsi frá hvørki B36 ella Piotr Krakowski.

Kristian á Neystabø, formaður í B36 sigur, at enn er einki avklárað viðvíkjandi venjaraspurninginum fyri komandi ár.

– Sáttmálin hjá Piotr Krakowski við felagið rennur út í ár, men enn hava vit ikki gjørt av, hvørt hesin sáttmálin verður longdur, ella um talan verður um annan venjara, sigur Kristian á Neysabø í stuttari viðmerking.

**-jm**